


GRANSKING

LESTUR | GRANSKING | DEILDIN | LEITA | INNANVEGGJA | ENGLISH | SEARCH | GO

- Granskingarevni
- Ph.D. verkætlanir
- NVD greinasavn
- Granskingarstovnar
- Greinarøð í bløðunum
- Vísindasøgur
  - Størri atlit til genetiska fjølbroytni
  - Íløgur í gransking í mun til BTÚ minka
  - Framvegis lítið til av toski á Bankanum
  - Dálking á Havnarvág
  - Er jarn avmarkandi fyri vøkstur í havinum?
  - Master samskipari og lestrarvegleiðari á vitjan.
  - FLL 2007 kapping
  - **Føroyska bládúgvan**
  - Føroyska músin
  - Væleydnað seismikkferð við Magnusi Heinasyni
  - Phd_verja av alduverkætlan
  - Føroyar liggja á kantinum
  - FLL 2006 kapping
  - 163 toskar í 29 hálum á Føroyabanka
  - Toskur: ein útbrótari
  - Gróður ávirkar kreftir
  - NVD á US Naval Academy
  - 10 dagar frá Tjernobyl
  - Seismikkur á Glyvursnesi
  - Norskur ríkmaður stuðlar gransking í heimbýi sínum
  - FLL kapping
  - Balinski fyrstu ferð
  - Mest geislavirkni í Hvalvík og minst í Hvalba
  - KT-nýskapan krevur útbúgving, gransking og samstarv
  - Miðalvekt á føroyskum seyði
  - Tøknifrágreiðing: Frá atkvøðum til tingsessir
  - Irsk forbindelse?
  - Føroyabanki
  - Alda og streymur
  - Fuglar í Viðarlundini
  - Fiskimiðasavn og kortplottari við streymkorti fyri nærleiðirnar.
  - DNA-kanningar
  - Streym til drívskipanir
  - Seismiskar kanningar á Glyvursnesi
  - Útgerð til aling á harðbalnum økjum
  - Grannljómarin
  - Geislavirkni regnaði yvir Føroyar
  - Kjafturin á føroyabankatoskinum
  - Gráspurvurin
  - Føroysk mjólk
  - Seismiskar kanningar í Vestmanna

Print

# Føroyska bládúgvan

**Nógvir av uppruna eginleikunum hjá føroysku bládúgvuni finnast framvegis, men hon blandar seg tó við tamar dúgvur. Sum frálíður, broytir hetta føroysku bládúgvuna**

Hetta var staðfest í einari kanning hjá Sólvu Jacobsen og Janu Mikkelsen, sum tær báðar hava gjørt í samband við bacherlorútbúgvingina í lívfrøði á Náttúruvísindadeildina á Fróðskaparsetrinum. Ritgerðin nevnist:

*Columba livia – a Study of the Rock Pigeon on the Faroe Islands.*

og snýr seg um, hvussu nógv er eftir av uppruna bládúgvuni í Føroyum.

## Bládúgvan fyri hóttafalli

Bládúgvan er ein gamal búfuglur í Føroyum, og telist í dag millum teir fáu uppruna stovnarnar, ið framvegis finnast Norðurevropa. Føroyska bládúgvan stendur tó fyri hóttafalli. Trupulleikin er, at hon kann para seg við tamdúgvuni. Av tí at tamdúgvan hevur verið ald í nógv harrans ár, finst hon í dag í nógvum ymiskum litbrigdum. Tá tann villa bládúgvan parar seg við tamdúgvuni, vil hetta sum frálíður broyta bládúgvuna, so minni og minni verður eftir av uppruna eginleikunum. Av hesi orsøk er upprunaliga bládúgvan ein doyggjandi rasa og er útdeyð um so gott sum alt Norðurevropa. Hesin trupulleikin er eisini galdandi um okkara leiðir: Í Íslandi er stovnurin longu útruddaður, og í Norra var í 2003 staðfestu, at ongar uppruna dúgvur vóru eftir í landinum.

Hildið verður, at tað í dag bert finnast nakrir næstan óblandaðir stovnar í Føroyum og nakra fáa staðni í Suður- og Eysturevropa.



Tann vanliga bládúgvan er eyðkend av tí hvíta gumpinum og tveimum svørtum veingja rípum.

## Føroysk bládúgva lítið blanda

Endamálið við kanningini hjá Sólvu og Janu var at staðfesta, hvussu nógv var eftir av uppruna bládúgvuni í Føroyum. Kanningin vísti, at føroyska bládúgvan er lítið blandað, men at blandingur tó fer fram millum villar og tamar dúgvur. Hetta vil sum frálíður broyta føroysku bládúgvuna. Kanningin vísti, at blandingin var størst í Skálavík, har 16% av bládúgvunum vóru blandaðar við tamdúgvur. Fyri alt landið var hetta talið 4,5%.

Les eisini greinina "Føroyska bládúgvan kann hvørva", sum Jana Mikkelsen skrivaði í Dimmalætting 27. apríl 2007.



Tveir bládúgvubiologar, Jana Mikkelsen og Sólva Jacobsen, til arbeiðis